# Bilastevna í KÌ-høllini

Í vikuskiftinum verður Kí-høllin karmur um eina stóra bilastevnu. Sum nakað nýtt verður tað ókeypis hjá vitjandi at koma inn.

Høllin verður full av bilum, umframt at fleiri bilar koma at standa uttanfyri.

Nógv av teimum kendastu bilmerkjunum verða umboðað. Bilsølurnar, sum vera við, eru: Ivan Johansen Bilar, Berg Motors, Reyni Service, Norðbil og Nordcar.

Úr Klaksvík verður sagt, at nú undirsjóvartunnilin er komin, er tað vorðið høgligari hjá bilasølunum at koma í Norðoyggjar at sýna bilarnar fram og harvið koma nærri sínum kundum.

Bilastevnan verður opin báðar dagarnar í vikuskiftinum frá kl. 15.00 til 21.00.




*Í vikuskiftinum verður Kí-høllin karmur um eina stóra bilastevna*

# Andlát og jarðarferðir

**Elsa Andreasen, Valurin Tvøroyri**, andaðist mánadagin 7. mai 77 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Tvøroyrar sjúkrahúsi, í kirkjuna í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju hósdagin klokkan 12.30. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, sum vilja minnast Elsu, kunnu lata Hjartafelagnum eina gávu, konta í peningastovnunum.

**Petrea Olsen á Toftum** fer til gravar úr Fríðrikskirkjuni í morgin, hósdagin 10. mai, klokkan 14.

# Læknaskrivarafelagið havt aðalfund

TÍÐINDASKRIV

Læknaskrivarafelag Føroya hevur havt aðalfund. Nevndin hevur skipað seg soleiðis: Sæunn Ólavsdóttir Hansen, formaður, Marna Gásadal, skrivari, og Beinta D. Mohr, kassameistari. Tiltakslimir eru Ruby Danielsen og Eyð Hansen.

Endamál felagsins er at virka fyri áhugamálum læknaskrivaranna. At styrkja sambandið millum læknaskrivararnar og at skipa fyri felags skeiðum, fyrilestrum og tiltøkum annars.


LÆGESEKRETÆREN SOM
KOORDINATOR OG ADMINISTRATOR

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at mín elskaði maður, okkara kæri pápi, verfaðir og abbi

**Rune Mattiasson**
Göteborg

andaðist 20. apríl.
Jarðarferðin verður úr Tynnered kyrka
hin 16. mai, kl. 11.

**Nanna**
**Jan-Erik, Gunilla, Samuel, David, Pauline og Linnéa**
**Kerstin, Rolv, Daniel, Björn og Olle**

*Tómt stendur plássið í okkara heimi.*
*Tungur verður vegurin einsamøll at ganga.*
*Takk, kæri maður, fyri farin ár.*
*Takk, góði pápi og abbi, fyri allan kærleika.*

Tit, ið vilja minnast Runa, kunnu senda eina gávu gávu til missiónshúsið í Hovi. Konta í peningastovnunum.

Rætting:

# Skipið var sjálvsagt Nólsoy

Í minningarorðunum um Petreu Olsen er eitt skipanavn komið skeivt fyri. Har tað stendur Neptun skal sjálvsagt standa Nólsoy. Bæði skipini gingu burtur í sama illveðri í 1934. Nólsoy við 20 monnum og Neptun við 23 monnum. Orsakið mistakið!

**ó.**



*Hetta er »Nólsoy«, ið gekk burtur í 1934, og víst varð til í greinini um Petreu Olsen*

**Dagurin**

**10. mai. Gordianus**, deyður í umleið 362. Heiðin rómverskur embætismaður, sum gjørdist kristin og varð hálshøgdur.

Lesið Sosialin so eru tit við